


Á myndini síggja vit ein Austin lastbil lastaður við eyðkendu trækassunum. Arbeiðsmennirnir eru: Ólavur Thomsen, sum enn starvast í fyritøkuni, Olgar Hansen, skipari, Álvur Magnusson, motorpassari, Volmar Biskopstø, stýrimaður




Tá Símun í Vági fór til Danmarkar í 1883 at læra til bakara, lærdi hann samstundis at bryggja øl



Viðoyggin avloysti Ósa og virkaði fram til umleið 1988, tá Føroya Bjór fór at brúka Strandferðsluna



Ósi var upprunaliga eitt vrak, sum blev sett í stand. Hann var seldur til útróðrarbát síðst í sekstiárunum. Olgar Hansen førdi ølbátarnar Ósan og Viðoynna



Brandur endaði sum útróðrarbátur í Esbjerg fyrst í sekstiárunum

# Føroya Bjór – ímyndin av Klaksvíkini

**Bryggjaríið, sum er sjálvboðin gestur við mangt eitt gestaboð í landinum, hevur í mong harrans ár verið sjálv ímyndin av Klaksvíkini**

Við meiri enn hundrað árum á baki er Føroya Bjór ein av teimum elstu og kendastu vinnufyritøkunum í Føroyum Fyritøkan hevur eina drúgva og spennandi søgu, sum fór av bakkastokki longu í 1888, tá Símun úr Vági fór undir at bryggja øl.

Símun F. Hansen, sum var hansara borgarliga navn, var abbi teir núverandi oddamenninar á Føroya Bjór, brøðurnar Einar og Heina Waag, og líka frá byrjan valdi hann veðrin at mynda bryggjaríið. Og nú, fyritøkan hevur 118 ár á baki, er veðrurin framvegis sjálv ímyndin av Føroya Bjór.

Símun vaks upp norðuri í Vági, og var giftur við Karin úr Funningsstovu í Havn, og áttu tey átta børn. Hann var ivrigur sjálvstýrismaður og var eitt nú millum undangongufólkini, sum kallaðu inn til jólafundin í 1888. Harumframt var hann háskúlamaður um ein háls, og var eisini millum teir føroyingar, sum veitraðu við Merkinum nógv ár fyri, at tað var alment góðkent.

## Tey trý ættarliðini

Tá Símun í Vági fór til Danmarkar í 1883 at læra til bakara, lærdi hann samstundis at bryggja øl. Fimm ár seinni var hann aftur í Føroyum og byrjaði sína egnu fyritøku. Eftir at hava arbeitt sum bakari, bryggjari, bóndi og reiðari í næstan 50 ár doyði hann 72 ára gamal í 1935. Sonurin, Einar Waag eldri, sum eitt skifti var løgtingsmaður, tók yvir og bygdi bryggjaríið út fleiri ferðir, áðrenn hann fyri skjótt 30 árum síðani lat triðja ættarlið koma til.

## Góðskan í hásæti

Í dag siga teir á Føroya Bjór, at teir leggja størsta dentin á ølgóðskuna, og at ølið hevur luttikið og vunnið heiðursprísir í mongum altjóða ølkappingum. Bryggjaríið sendir alla tíðina øl til kanningar á starvsstovu og eisini til uttanveltaðar smakkroyndir hjá ølserfrøðingum á Alfred Jørgensen Gæringsfysiologisk Laboratorium. Hesir siga, at ølið roynist væl millum bestu øl sløg í heiminum.

Føroya Bjór røkir umleið 70 prosent av føroyska marknaðinum fyri pilsnarøl og 60 prosent av gulløli. Men Føroya Bjór er ikki bert øl. Sodavatnið er eisini vælumtókt, og er meiri enn onnur hvør sodavatn, ið verður drukkin í Føroyum, frá Føroya Bjór. Umleið 40 fólk starvast á Føroya Bjór, harav 18 á skrivstovuni og bryggjarínum í Klaksvík. Bryggjarii hevur fimm deildir kring landið, á Tvøroyri, í Skálavík, í Havn, Leirvík og Klaksvík.